# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Tvær góðar máltíðir saman við einum viðfáningi av donsku umboðunum í 21-mannanevndini viðvíkjandi Føroyum, har folketingsmedlem Høgni Karsten Hoydal og folketingsmedlem Anfinn Kallsberg taldu triðingin av teimum uppmøttu í »den danske delegation« elvdu til stórtíðindi í útvarpinum*

JOHN JOHANNESSEN, LØGTINGSMAÐUR

## Ferðin

Føroyar liggja illa til í altjóða ferðsuhagtølum. Vita hava alt ov nógvar vanlukkur, og alt ov nógv farast í ferðsluni. Fráfarandi formaðurin í Ferðslutrygd hevur gjørt eitt stórt arbeiðið fyri at gera Ferðslutrygd sjónligari og fyri at fáa okkum at bera okkum skilabetri at í ferðsluni. Nú leggur Rúna Siversten frá sær, og tað er mikið spell. Hon tóktist hava júst tað, sum ein formaður skal hava: visjónir, mót og evni til at koma á tal við almenningin.

Fráfarandi formaðurin er atfinnandi mót ferðslulógini, sum hon heldur er ov lin í støðum. Tað er serstakliga ferðin, og sum upptekur hana. Tað tykist heldur ikki klókt at loyva størri ferð á okkara vegum. Vegirnir eru ikki gjørdir til at taka ímóti ferðslu meira enn 80 km/t. Tað kann tí als ikki vera rætt at loyva meira ferð. Allur ferðslupolitikkurin í Føroyum tykist vera innrættaður eftir tørvi bilistana. Eingi fyrlit verða tikin fyri súkklandi ella gangandi. Skúlar verða bygdir við stórar vegir, og alt ov lítið verður gjørt fyri at tryggja skúlavegin hjá børnum. Ferskasta dømið um hendan ørvitispolitikk er forskúlin í Hoyvík, sum stendur skamt frá Føroya mest trafikkeraða vegi. Við at flutt skúlan 300 m, kundi hann staðið úti í Guds fríu náttúru!

Nú er upp á tíðina, at avvarðandi myndugleikar fara at taka ferðsluna í álvara. Her má setast inn á øllum økjum: lóg, uppaling, í skúla og í ferðslufrálæruni. Tað eigur at vera nógv meira ferðslupoliti á vegunum, og tað skal ikki vera møguligt hjá ferðsyndarum ella rúsdrekkakoyrarum at rokna út, hvar politiið er. Tað skal verða strangt eftirlit í tunnlunum, og ov nógv ferð í hesum skal ikki góðtakast. Ein ferðsluvanlukka í tunnlum kann jú skjótt gerast til eina veruliga katastrofu. Í hesum máli eru vit øll sek, men tað frítekur ikki avvarðandi politikarar og myndugleikar fyri at gera nakað - og tað skjótt. Lurtið eftir Rúnu Sivertsen og roynið at finna ein eins framfýsnan og eldhugaðan formann til Ferðslutrygd, so nakað munagott hendir. Vit kunnu ikki liva við hesum vanlukkunum, og 0-hugsjónin má takast í nógv størri álvara.

**Sosialurin**

# Fjøður gjørdist fimm høsn

**JOHN JOHANNESSEN**
løgtingsmaður
www.john.fo



**Ein røð av ómetaliga løgnum fjølmiðlasøgum hava eftir øllum at døma tikið seg upp í kjalarvørrinum á regluligu kurteisisvitjanini hjá løgtingsins uttanlandsnevnd í Keypmannahavn týsdagin og mikudagin**

Tvær góðar máltíðir saman við einum viðfáningi av donsku umboðunum í 21-mannanevndini viðvíkjandi Føroyum, har folketingsmedlem Høgni Karsten Hoydal og folketingsmedlem Anfinn Kallsberg taldu triðingin av teimum uppmøttu í "den danske delegation".

Harumframt ein lítil óformellur ábitsfundur við Per Stig Møller, uttanríkisráðharra, saman við donsku umboðunum, Piu Larsen, Ola Stavad, Høgna Karsten Hoydal og Anfinni Kallsberg.

Hetta er í fjølmiðlunum sett fram sum ein stórur samráðingarfundur, har danir fullkomiliga hava sett okkum stólin fyri hurðina – enntá á fleiri økjum. Sambært fjølmiðlunum hava teir:

1. Við uttanríkispolitisku heimildarlógini í hondini sýtt okkum at gerast limir í norðurlendska ráðharraráðnum.

2. Avlýst allan møguleika fyri einum EFTA limaskapi.

3. Skuldsett løgmann fyri at renna ørindi fyri uttanríkisráðið og fjala upplýsingar fyri uttanlandsnevndini.

### Spunnar søgur

Tað er rættiliga ørkymlandi – fyri ikki at siga skelkandi – at koma heim aftur frá hesi lítlu døgurðavitjanini og hoyra hesi stórtíðindi. Vóru søgurnar sannar, so mugu vit staðfesta, at Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg hava rættiliga stórt vald. Tí so lítil var danski áhugin fyri vitjanini, at Høgni og Anfinn donsku megin borðið í fleiri førum nærum áttu meirilutan hesar báðar dagarnar.

Tað er rætt, at eitt vet av kolonihugburði bleiv førdur fram yvir borðið. Men ikki so nógv um fyrr nevndu viðurskifti. Eg var sjálvur fyrstur at mótmæla, tá forkvinnan í donsku nevndini vildi hava at vita, hví vit hava tikið stig til okkara egna menningarpolitikk í samstarvi við onnur lond enn Danmark.

Hetta er eitt mál, sum eitt samt løgting hevur sett sær fyri, og tí hava danir ikki rætt til at finnast at hesum á nakran hátt. Men løgi kortini, at formaðurin í uttanlandsnevndini beinanvegin tók orðini til sín sambært grein í Dimmalætting, har hann ynskir, at vit fylgja ráðunum frá Piu Larsen.

### Harhoff og heimildin

Viðvíkjandi uttanríkispolitisku heimildarlógini er tað rætt, at vit fingu sendandi eitt bræv frá folkarættarserfrøðinginum, Frederik Harhoff, har hann umtalar møguleikan fyri limaskapi í norðurlendska ráðharraráðnum. Harhoff sigur, at vit helst ikki kunnu brúka heimildarlógina til at vinna okkum limaskap og vísir til grein 19 í grundlógini, um at ríkið ikki kann verða umboðað av bæði Danmark og Føroyum í sama altjóða felagsskapi.

Men hetta merkir ikki, at heimildarlógin er eitt stórt afturstig. Hon kann bara ikki brúkast sum instrument í júst hesum máli, tí gamla grundlógin og fundamentalistiskartulkingar hjá donskum løgfrøðingum av grundlógini eru ein forðing.

### Per Stig og EFTA

Tað er heldur ikki rætt, at Per Stig Møller avlýsti allar møguleikar fyri einum føroyskum EFTA limaskapi. Danski uttanríkisráðharrin gjørdi hinvegin púra greitt, at so leingi vit brúka taktikkin hjá Sambandsflokkinum, um at føla okkum fram bæði hjá EFTA og ES samstundis, so fáa vit hvørki limaskap í EFTA ella ES. Tí limalondini í EFTA og ES taka teg ikki í álvara sum land, fyrr enn tú hevur tikið eina heilt greiða støðu heima hjá tær sjálvum og sendir eina greiða umsókn til tann felagsskapin, har tú av álvara ynskir at gerast limur.

Nú Johan Dahl og Útvarpið siga, at Per Stig Møller skal vita at siga, at Sveis ikki vil vita av okkum sum EFTA land, so skulu hesi tíðindi síggjast í ljósinum av tí, eg júst nevndi omanfyri. Nevniliga, at Sveis og onnur ikki taka okkum í álvara, so leingi vit ríða á fleiri hestum samstundis.

Eftir øllum at døma er tað onkur í politisku skipanini, sum ikki vil, at tað skal bera til hjá Føroyum at standa saman ímóti umheiminum og býttisligum donskum kolonitonkum. Tí hesar løgnu fjølmiðlasøgurnar.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**
**Sosialurin**
Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.